## Celtic vann steypafinaluna

Stóru skotsku feløgini Celtic og Rangers spældu sunnudagin Liga Cup finalu, og tað endaði við, at Celtic, sum eisini er oddalið í landskappingini, vann dystin. Úrslitið gjørdist 2-0, men neyðugt var við umdysti fyri at fáa mál. Eftir 90 minuttir var málleyst, men í umdystinum tryggjaðu Darren O'Dea og Aiden McGeady Celtic sigurin, sum er felagsins 14. sigur í Liga Cup kappingini.



## Víkingur spælt dystir í Íslandi

Um vikuskiftið hevur Víkingur verið á stuttari venjingarlegu í Íslandi, har liðið hevur spælt tveir dystir móti feløgum í bestu íslendsku deildini. Í fyrra dystinum var var mótstøðuliðið Stjarnan, sum er uppflytari í Landsbankadeildini. Hesin dysturin endaði við javnleiki 1-1, og Finnur Justinussen skoraði fyri Víking.. Seinni dysturin var ímóti meistaraunum FH, og tann dystin tapti Víkingur 2-0.

SÍ-Dráttur 3-2 (28-26, 21-25, 19-25, 25-23, 15-10)

# Dráttur rakk ikki á mál

**Einasti møguleikin hjá Drátti fyri at fáa heiðursmerki, var at vinna á SÍ. Tað var nær við, men eftir ein góðan fimmsettara mátti Dráttur lúta fyri greipuvinnarunum.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Einasti møguleiki hjá Drátti at fáa heiðursmerki leygardagin, var at vinna grannauppgerðina í Sørvági ímóti greipuvinnarunum úr SÍ. Á pappírinum ein torfør uppgáva, men als ikki ógjørlig, skuldi tað vísa seg – hóast Dráttur ikki vann upp land í síðsta enda.

Fyrsta settið í hesum dystinum var eitt, har bæði lið vístu seg frá síni allarbestu síðu. Her var spælt fyri lívinum, og væl lá fyri, so áskoðararnir fingu veruliga valuta fyri pengarnar.

Hjá Drátti skuldi tað tó vísa seg, at eydnan ikki heilt var við, tí miðskeiðis í settinum var Ruth Thomassen, sum hevur stóran týdning fyri liðið, so óheppin at koykja sær fótin, og tað gjørdist greitt, at hon í øllum førum ikki fekk spælt meira. Men kvinna kemur í kvinnu stað, og tað vísti seg eisini at verða so her, tí Helga Nordendal gjørdi tað sera gott á kantinum, tá hon yvirtók plássið hjá Ruth.

Dráttur lá eisini nokk so væl fyri, tá settið fór at nærkast endanum, tí kvinnurnar úr Sandavági og Miðvági vóru á odda 22-17, men so kom SÍ afturíaftur og tað gav ein sera spennandi enda á settinum. Tá avtornaði, vann SÍ tað 28-26.

### Dráttur nær við

Síðani komu tvey sett, har Dráttur hevði munin og eisini vann. Hesi bæði settini spældi Dráttur væl, meðan tað knípti eitt sindur hjá SÍ at fáa spælið at hanga nóg væl saman alla tíðina, nú fleiri av teimum ungu sluppu at royna seg. Annað sett vann Dráttur 25-21 og triðja 25-19.

Framvegis hevði Dráttur hug at vera eitt sindur frammanfyri í fjórða setti, hóast tað gjørdist rættiliga tætt ímóti endanum. Eitt skifti var Dráttur frammanfyri 19-15, men so fekk SÍ fatur í rætta endanum, samstundis sum Annika á Stongum hevði nakrar góðar servur, og SÍ vann settið 25-23.

Nú var so fimta og avgerandi settið eftir, og nú valdi SÍ at koyra við sterkastu manning. Dráttur byrjaði tó betri og kom upp á 4-0, men SÍ svaraði aftur til 4-4. Her gjørdist hálvavegna eitt »time-out kríggj« millum liðini, ið ikki vildu lova hinum at fara avstað, men endin var, at SÍ kom upp á 9-7 og síðani helt fast og vann settið 15-10 og dystin 3-2.

Fyri SÍ var tað sjálvandi stuttligt at vinna eisini seinasta dystin, nú gullheiðursmerkini lógu og bíðaðu, men fyri Dráttur var ósigurin hinvegin tungur at taka, tí hann merkti, at Dráttur í evstu løtu misti møguleikan at fáa heiðursmerki.



*Serliga fyrsta sett í dystinum í Sørvági, sum endaði við fimm settum, var væl úr hondum greitt av báðum liðum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fleyr-ÍF 3-0 (25-19, 25-14, 25-17)

# Fleyr gjørdi slætt borð

**Fleyr, sum tað nógva av kappingarárinum hevur verið upplagdur silvurkandidatur, lyfti seg í seinasta dystinum og vann silvurið við sera sannførandi sigri á ÍF.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tey fýra liðini, sum hava kappast um at verða næstog triðbest aftan á SÍ, gjørdu øll sítt til, at nógv var eftir at spæla um, hóast SÍ í úrtíð hevði tikið meistaraheitið, tí síðstu vikurnar hava tey mestsum skiftst um at taka sigrar frá hvørjumøðrum, so eingin slapp frá hinum.

Av teimum fýra var Fleyr leingi – at síggja til – tað sterkasta. Men hóast Fleyr eftir taptu steypafinaluna ætlaði at taka SÍ í landskappingini, brast tann vónin longu vikuna eftir, og so vóru tær á havnarliðnum ikki longur so tryggar á hondunum, sum tær annars høvdu verið.

Men nú alt stóð upp á spæl í hesum seinasta heimadystinum í Gundadalshøllini ímóti ÍF, fann Fleyr styrkina fram av nýggjum og spældi ein sera góðan dyst, ið ikki gav ÍF nakrar sum helst møguleikar at troka seg framvið og stinga av við silvurmerkjunum fyri nøsini á vertunum.

### Óluva var framúr

Í teimum báðum fyrstu settunum var eingin sum helst ivi um betra liðið á vøllinum, og við settúrslitunum 25-19 og 25-14 setti Fleyr eina tjúkka striku undir, at nú var tað ramasti álvari. Hjá ÍF royndi Helen á Lakjuni Jacobsen at halda flaggið høgt, men restin av liðnum fylgdi ikki við, og so kundi ikki annað enn tap standa fuglfjarðarkvinnum í hendi.

Hjá Fleyr var talan nógv meira um eitt liðavrik og eitt vælvirkandi kollektiv, men tó má nevnast mest eyðsýndi spælarin, sum var unga Óluva Mohr, ið spældi ein branddyst á kantinum, har hon til fulnar livdi upp til tað álit, venjararnir høvdu givið henni undan hesum týdningarmikla dysti.

Einastu ferðina, ÍF sá út til at gera ein vørr, var í triðja setti, tá tað eydnaðist at koma framum 4-0. Men tað vardi bara ta løtuna, tí skjótt hevði Fleyr kvitterað og kom upp á 6-6, og so koyrdi tað bara. Fleyr kom fyrst upp á 23-11, áðrenn ÍF royndi at toga ímóti eina løtu, men at enda mátti geva seg, so Fleyr vann settið 25-17.

### Mjølnir bronsu

Harvið ein greiður og uppiborin 3-0 sigur til Fleyr, sum sostatt fekk silvurmerkini – eins og tað í hesum kappingarárinum gjørdist til silvur í steypakappingini.

Og tá Dráttur samstundis tapti ímóti SÍ, endaði tað við, at Mjølnir – uttan at spæla – kundi fáa bronsuna. Av teimum fýra, ið høvdu kjansin undan seinastu dystunum, vórðu tað sostatt ÍF og Dráttur, ið sótu eftir við ongum…

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 18 | 16 | - | 2 | 51 | 24 | 27 | 21 |
| 2 Fleyr | 18 | 11 | - | 7 | 40 | 28 | 12 | 15 |
| 3 Mjølnir | 18 | 11 | - | 7 | 41 | 31 | 10 | 14 |
| 4 ÍF | 18 | 10 | - | 8 | 36 | 30 | 6 | 14 |
| 5 Dráttur | 18 | 10 | - | 8 | 41 | 34 | 7 | 13 |
| 6 KÍF | 18 | 5 | - | 13 | 30 | 44 | -14 | 7 |
| 7 TB | 18 | 0 | - | 18 | 6 | 54 | -48 | 0 |